## Fáa eisini gull

Hóast íslendsku hondbóltshetjurnar taptu OL-finaluna móti Fraklandi, so fáa teir kortini gull. Íslendska stjórnin hevur nevnliga gjørt av, at landsliðsspælararnir skulu heiðrast við sonevnda falka-ordaninum. Falkurin sjálvur er úr silvurið, men hann hevur gylta rond, og soleiðis fáa spælararnir hóast alt nakað av gulli.



## Høsnarungin hevur súkkluskúla

Michael Rasmussen er framvegis óynsktur í altjóða súkkluheiminum, eftir at hann í fjør royndi at skáka sær undan doping-roynd. Og tá tú ikki kanst kappast móti teimum bestu, so mást tú gera okkurt annað. Tí er Michael Rasmussen – Kylling – nú millum lærararnar á einum súkkluskúla í San Diego í USA, har luttakaranir sleppa at royna seg í kapping, sum fevnir um seks dagar. Sjálv kappingin verður í døgunum 9. til 15. november, og á www.gftours.com ber til at tekna seg, um áhugi skuldi verið fyri tí.

# Finnur Hansson er stoltur av landsmonnum sínum

**Finnur Hansson, Jakob Jónsson og hópurin hjá Neistamonnum høvdu tann stóra forrættin at verða staddir í Íslandi á venjingarlegu, júst ta vikuna sum íslendska hondbóltslandsliðið framdi søguliga bragdið**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Finnur Hansson er sjálvur úr tiltiknari íslendskari hondbóltsfamilju. Og hann er samdur við øðrum íslendingum í, at OL-silvurið er størsta bragdið í íslendskari hondbóltssøgu*

Finnur Hansson segði við Rás2 sunnudagin úr Selfossi á íslendska Suðurlandinum, at íslendska landsliðið rakti ikki dagin. – Vit fóru ikki nóg góðir í dag, vit vóru bara ikki nóg skarpir, tá saman um kom. Meðan fraklendingar, sum hava fleiri royndir, tá tað kemur til finalur, vóru væl betri fyri til stóru uppgávuna. Eg haldi, at tað var tað, sum gjørdi munin.

Finnur heldur, at íslendingar sóu heldur mettir út, aftaná hálvfinalusigurin á Spania. Finnur heldur, at tað manglaði í hjá Íslandi, bæði í álopspartinum, og í verjupartinum. Málverjin, Bjørgvin Páll Gústavsson kom ikki í gongd beinavegin, og heldur Finnur, at verjan átti eisini sín lut í hesum. Íslendingar vóru ikki til reiðar, og teir tríggir brendu málmøguleikarnir frá vonginum, sum franski málverjin, Thierry Omeyer tók vóru eisini ringir fyri íslendska sjálvsálitið. Kortini heldur Finnur Hansson, at verjan samanumtikið kanska var frægasti parturin á liðnum.

– Vit mugu heldur ikki gloyma hvørjar spælarar íslendingar vóru upp ímóti. Eg haldi sjálvur, at hetta eru Heimsins bestu hondbóltsspælarar í løtuni, tað er einki at ivast í. Í sær sjálvum er tað rættiliga flott at kunna halda einum liðið, sum Fraklandi undir 30 skotin mál.

### Er stoltur

Spurdur um ein kortini er nøgdur við OL-kappingina hjá íslendska hondbóltslandsliðnum, svarar Finnur:

- Ja, eg eri veruliga stoltur av teimum, tað er so púra vist.

Finnur fortelur, at allur hópurin hjá Neistanum sat inni í biografsalinum í Selfossi fyri at síggja dystin, og har sótu fólk við blandaðum kenslum aftaná OL-finaluna. Biografsalurin var á tremur við fólki, og sjálvandi vóru fólk vónsvikin beint aftaná dystin. Øll høvdu ynskt ein betri, javnari og meiri spennandi dyst. Men tá »Strákar okkar« fingu silvurheiðursmerkini handað, var fagnaðurin kortini stórur.

Spurdur um hann, Jakob og Neistaleikarnir ikki eru glaðir fyri at hava verið staddir í Íslandi, meðan íslendska hondbóltslandsliðið hevur framt síni brøgd, svarar Finnur:

- Jú tað hevur sanniliga verið ein fantastisk upplifing. Tá hálvfinalan var spæld ímóti Spania vóru vit í sølumiðstøðini, Smáralind, og hugdu eftir dystinum saman við hundraðtals íslendingum. Í gjárakvøldið (leygardagin red.) vóru vit og spákaði runt Reykjavík, har tað var Mentunnarnátt, har vit m.a. hugdu eftir tí stórsligna fýrverkinum. Har gekk bara alt runt og tosaði um hondbólt. Tað tyktist, sum tónleikarnir bara hitaðu upp til OL-finaluna, sum skuldi verða dagin eftir. Sum forseti Íslands sigur: »Hetta er størsta ítróttarbragdið í søgu Íslands«. Òlafur Ragnar Grímsson mintist aftur á stóru gleðina í Íslandi, tá Vilhjálmur Einarsson vann silvur við summarleikirnar í Melbourne, Avstralia í tí Harrans ári, 1956. Men Finnur er samdur við Òlafi Ragnari, at OL-silvurið hjá »Strákunum« er størsta ítróttaravrikið í íslendskari ítróttarsøgu. Íslendska fólkið fer at feira »Strákarnir«, sum tjóðarhetjur, og fer at takka teimum fyri alt, sum teir hava givið tjóðini gjøgnum sítt frálíka spæl og undirhald. Finnur ivast ikki í, at stóra hátíðarhaldið, sum verður tá hondbóltslandslið kemur heim, fer næstan at fáa tjóðardagin, 17. Juni at blikna!

– 17. Juni er hvørt ár, um eg eri heppin, so komi eg kanska einaferð aftrat at uppliva, at Ísland kemur í eina olympiska finalu í hondbólti.

## Óli Stef fekk sítt heitið við landsliðnum

**Ólafur Stefánsson hevur vunnið alt, sum vinnast kann, sum hondbóltsspælari. Nú hevur hann krýnt verkið við einum OL-silvurmerki**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

35 ára gamli Ólafur Stefánsson - ella "Óli Stef", sum íslendingar nevna hann - hevur vunnið nógv í hondbólti. Hann hevur spælt hondbólt á hægsta støði í Evropa, í bæði Týsklandi og Spania, sum eru tær bestu og pengasterkastu hondbóltsligurnar í Evropa.

**Her eru øll heitini, sum Ólafur Stefánsson hevur vunnið við feløgum sínum:**
1993: íslendskur meistari við Vali
1994: íslendskur meistari við Vali
1995: íslendskur meistari við Vali
2002: týskur meistari við SC Magdeburg
2004: spanskur meistari við Ciudad Real
2002: Champ. League vinnari við SC Magdeburg
2006: Champ. League vinnari við Ciudad Real
2004: Steypavinnari við Ciudad Real
2005: Steypavinnari við Ciudad Real
2006: Steypavinnari við Ciudad Real
2007: Steypavinnari við Ciudad Real
2008: OL-silvur við íslendska landsliðnum

**Persónligu heitini hava verið hesi:**
2002: ársins ítróttarmaður í Íslandi
2003: ársins ítróttarmaður í Íslandi
2002: valdur á EM All-star liðið
2004: valdur á OL All-star liðið
2008: valdur á OL All-star liðið
2002: EM-toppskjútti við 58 málum
2002: toppskjútti í Champions League
2004: toppskjútti hjá Ciudad Real
2001: toppskjútti Íslands við HM
2003: toppskjútti Íslands við HM
2004: toppskjútti Íslands við EM
2004: toppskjútti Íslands við OL
2005: toppskjútti Íslands við HM

Haraftrat er Òli Stef besti málskjúttin í søguni hjá SC Magdeburg. Óli Stef hevur áður verið nr. 4, 5, 7, 9. 11 og 15 við íslendska landsliðnum til OL, HM og EM-endaspøl.